Leikhúsið Gríma

sýnir leikin

Góðir dagar

eftir Samuel Beckett

leikstjórn Eyðun Johannessen

á Meiarínum

sunnudagin 28.04.2002 kl. 18.00
mikudagin 01.05.2002 kl. 20.00
hósdagin 02.05.2002 kl. 20.00

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning.
Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

Bert fáar sýningar afturat

Læraraútbúgvingin

Vilt tú vera lærari?

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytirnar fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

L æ r a r a ú t b ú g v i n g i n

– ein útbúgving fyri lívið

Námsliga útbúgvingin

Vilt tú vera pedagogur?

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytirnar fyri upptøku á námsligu útbúgvingina eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

N á m s l i g a ú t b ú g v i n g i n

– ein útbúgving fyri lívið

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

Fráboðan

Við hesum boðar Føroya Pro Vita frá, at aðalfundur felagsskapsins verður hildin á Kambsdali leygardagin tann 11. mai 2002. Við á fundinum verða Torben og Ingegerd Riis úr Danmark. Fundurin byrjar kl. 13.30.

Nevndin fyri Føroya Pro Vita

VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag og leygardagin:
Stívt andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin umleið 7 stig.



Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk millum eystan og landsynning. Skýggjað og regn í skiftum. Hitin 7–10 stig.

Familjudeild á Barnaheiminum

BARNAHEIM

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Seinasta árið hevur landsstýrið arbeitt við at endurskoða virksemið hjá Barnaheiminum. Endamálið hevur verið at skipa Barnaheimið sum ein nýggjan stovn við fjølbroyttum tilboðum til børn og ung við serligum tørvi.

Hendan endurskoðan er nú liðug og landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum Sámal Petur í Grund hevur tikið undir við arbeiðinum hjá nevndini.

Í næstum verður søkt eftir 10 fulltíðarstarvsfólkum við fjølbroyttum útbúgvingum til nýggja Familjudeild á Barnaheiminum, sum væntandi letir upp 1. august í ár. Harumframt verður søkt eftir einum fulltíðarstarvsfólki til Ungdómsdeildina á Barnaheiminum.

Familjudeildin verður ein deild, har familjurnar kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Staðið er ætlað familjum, har foreldrini av ymiskum orsøkum illa megna at røkja uppgávurna sum foreldur, og har mistrivnaður er í familjuni, sigur Almanna og Heilsumálastýrið í einum tíðindaskrivi.

Endamálið við uppihaldinum er at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupulleikar familjan hevur og hvussu hon best kann stuðlast framyvir.

Væntandi verður eisini ein nýggj Smábarnadeild latin upp á Barnaheiminum í nærmastu framtíð. Deildin skal taka ímóti børnum frá 0-12 ár. Áðrenn hendan deildin verður latin upp, verður tað uppgávan hjá Familjudeildini og Ungdómsdeildini á Barnaheiminum at taka sær av smábørnum við bráfengistørvi á uppihaldsstaði.

Og nú beint upp undir val lata við Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, sleppa at siga, at hann fegnast um, at tað hevur eydnast at loysa tann akutta trupulleikan á stovnsplássi á Barnaheiminum í hesum valskeiðnum.

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst við Ísland fer í ein landnyrðing og lýggj luft rekur inn yvir Føroyar sunnaneftir, men hósnáttina kemur eitt brúgvalag við kaldari luft og ælingi at liggja við Føroyar.



Fríggjadagin fer eitt lágtrýst at dýpast við Føroyar, og liggur í vikuskiftinum eystan fyri oyggjarnar og hevur væl av vindi og regni við sær.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷7
Nuuk	÷2
Qaqortoq	8
Ammassalik	0
Saint John's	2
Halifax	6
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	9
Lerwick	10
Aberdeen	14
London	20
Tromsø	6
Bergen	8
Oslo	–
Stokkhólm	17
Keypmannah.	13
Helsinki	13
Moskva	14
Berlin	15
Warzawa	16
Kiev	13
Bukarest	13
Paris	20
Madrid	19
Róm	19
Malorca	22
Athen	–
Malta	17
Tunis	16
Beijing	15
New Dehli	36
Bangkok	36
Jakarta	32
Sydney	21
New York	9
Miami	27
Los Angeles	20
Meksikobýur	–
Panama	33
La Paz	6
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	13

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/04 kl. 06⁰⁰– 24/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 4,0 mm – mált frá 23/04 kl. 06⁰⁰– 24/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 45,5 mm

Lesið Sosialin

VESTFALLSKYRRINDI

20. apríl: Fyrra kvarter
25. apríl: Mánin nærstur jørðini
27. apríl: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar—/ Vágafirði fp.	Vágafirði sp.	Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp.	Skúvoyar—/ Skopunarfirði sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	Hestfirði/ Sundalagnum sp.	Vestmanna—sundi fp.	Vestmanna—sundi sp.	Mykines—firði fp.	Mykines—firði sp.	Nólsoyar—firði fp.	Nólsoyar—firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirviksfirði/ Haraldssundi fp.	Leirviksfirði/ Haraldssundi sp.	Kalsoyar—/ Svinoyarfirði fp.	Kalsoyar—/ Svinoyarfirði sp.	Hvanna—sundi fp.	Hvanna—sundi sp.	Fugloyar—firði fp.	Fugloyar—firði sp.
26. apr	06.38	19.03	05.38	18.03	05.53	18.18	08.38	21.03	09.38	22.03	04.53	17.18	03.53	16.18	06.53	19.18	07.53	20.18	06.23	18.48	07.38	20.03
27. apr	07.28	19.54	06.28	18.54	06.43	19.09	09.28	21.54	10.28	22.54	05.43	18.09	04.43	17.09	07.43	20.09	08.43	21.09	07.13	19.39	08.28	20.54
28. apr	08.20	20.47	07.20	19.47	07.35	20.02	10.20	22.47	11.20	23.47	06.35	19.02	05.35	18.02	08.35	21.02	09.35	22.02	08.05	20.32	09.20	21.47
29. apr	09.14	21.41	08.14	20.41	08.29	20.56	11.14	23.41	—	12.14	07.29	19.56	06.29	18.56	09.29	21.56	10.29	22.56	08.59	21.26	10.14	22.41

5 707265 100050 >